# Nøvn

## Til Johan Kass
## á áttati ára degnum 29. juli

Ja, áttati ár tykist so veruleikafjart, tá vit kenna mannin aftan fyri talið. Tey hóska sum so ikki saman, tí maðurin er als ikki gamal, tvørturímóti. Í tonkum, sinni og verumáta, júst tann sami sum altíð.

Tú hevur altíð verið sera áhugaður í øllum sum gongur fyri seg rundan um teg - í familjuni, í bygdini, á arbeiðsplássinum, í landinum, í umheiminum o.s. framvegis. Øgiliga orienterandi, spyrjandi, kannandi og forvitin á ein positivan hátt. Veit nógv um alt – um skip, fiskiskap og prísir, um ítrótt og politikk, uttanlandsviðurskifti, um fólk og fæ, ætt og familju og slíkt, sum hevur við lív og levna at gera. Ja, tú nærum dyrkar hetta at finna útav hvør er hvør, og hvaðani fólk eru.



Tú hevur altíð verið sera 'sosialur', og havt lætt við at koma í samband við fólk, eisini tey tú ikki kennir. Finnur eitt hóskandi høvi ella evni, og so er 'hol ígjøgnum'. Dámar væl at kenna og práta við fólk.

Sum persónur er tú sera tilvitaður um og upptíkin av, at ting gerast betur – og at tað, vit hava við at gera, verður gjørt á skilabesta hátt. Tú hevur ofta viðmerkingar til ymiskt sum fyriferst, um tað eru arbeiðsstøður, samferðsluviðurskifti, liviumstøður ella líknandi, og haldi eg, at tú við tínum hugella uppskotum ofta rakar seymin á høvdið. Í stuttum kemur hetta nokk undir tað at vera praktiskur, rationellur og effektivur.

Sum arbeiðsmaður var tú iðin, røkin, hjálpsamur og trúfastur. Arbeiðslívið var í høvuðsheitum umborð á oljubátum – Esso Søldarfjørð, Esso Føroyum og Stathav. Mangan var baldrut millum oyggjarnar, og eg minnist, vit onkuntíð vóru bangin um tykkum, tí veðrið var so ófantaligt.

Um sumrarnar avloysti tú onkuntíð við størri skipum, sum førdu olju til Føroya. Minnist einaferð, at eg eisini kom við oljuskipinum Magn úr Danmark og aftur staðfesti, hvussu arbeiðssamur, hjálpsamur og alsidigur tú altíð er. Tú hevði starv uppi á brúnni, men tú vaskaði eisini ofta upp saman við kokkinum ella bankaði rust við teimum á dekkinum. Ongantíð bangin fyri at gera ov nógv.

Tú hevði altíð so gott og kammeratsligt forhold til arbeiðsfelagarnar, hóast ofta stóran aldursmun.

Tú ert 'lunur, rúmligur, hevur eitt róligt og gott gemyt', og elskar gott skemt og vittigheitir, og hevur ofta undirhildið í smærri veitslum.

Sum abbi hevur tú eisini verið teimum smáu besti abbi, og tikið tær nógv av teimum. Kanska eru tað onkuntíð 'for nógvar kioskvitjanir', men tankin er sum altíð góður og gávumildni sum hjá fáum.

Hesi seinnu árini hava dagarnir snúð seg mest um tað heimliga, - vitja fólk, seyðahald, passa abbabørn, samfelagslív og zappa millum kanalir fyri at fáa tíðindi, vitan og undirhald..

Hjartaliga tillukku við degnum góði pápi, verpápi og abbi. Má Guð signa og geva okkum nógv ár afturat.

Takk fyri tína umsorgan!

**Vit øll**
**Bergun**





W W W . S O S I A L U R I N . F O


# Merkisdagar

### Prógv
Beinta Óladóttir Hansen var 10. august útlærd innan skrivstovu við grein fyrisiting. Læurupláss P/F Poul Hansen heilsølu.

### Gullbrúdleyp
Fríggjadagin 13. august kunnu Ásla og Tórbjørn Poulsen í Havn halda gullbrúðleyp. Veitsla verður sama kvøld fyri innboðin. Tey sum annars hava hug at hitta brúðarparið eru vælkomin heima í Bóndabrekku leygardagin eftir kl. 15.

### Silvurbrúdleyp
Týsdagin 10. august hava vit, Paulina og Erik Eliasen, Syðradali K, verið gift í 25 ár. Vit halda dagin á Syðradali. Opið hús verður leygardagin 14. august frá kl. 14.30 til kl. 23. Sam siglir av Klaksvík kl. 14.15 - 17.15 - 22.15. Av Syðradali kl. 17.35 - 22.35.

### Silvurbrúdleyp
Týsdagin 17. august hava Emly og John H. Petersen Klaksvík verið gift í 25 ár. Veistlan verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19 fyri innbodnum.

### Silvurbrúdleyp
Týsdagin 17. august hava Jónleyg og Fríðálvur Bláhamar, Vestmanna, verði gift 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 21. august frá kl. 12 til 18 í ítróttarhøllini í Vestmanna. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða vinaliga biðin um at siga frá innan 4. august á tlf. 424407.

### 90 ára føðingardagur
Mikudagin 18. august verður Elsa av Reyni 90 ár. Dagurin verður hildin í Starvsmannafelagshúsinum J.H. Schrøtersgøtu 9. Tey, ið kundu hugsað sær at heilsa uppá Elsu, eru vælkomin millum kl. 16 og 20.

### 80 ára føðingardagur
Fríggjadagin 13. august fyllir Bodil Hansen ætta úr Rituvík, búsitandi í Sønderborg, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttruni í Frederikshavn leygardagin 14. august kl. 11. Adr.: Kastanievej 9, 9900 Frederikshavn.

### 80 ára føðingardagur
Mánadagin 16. august verður Jóhan Lervig, fyrrverandi smiðjumeistari á Skála, 80 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 15. august kl. 16 í ítróttarhøllini á Skála, har øll eru hjartaliga vælkomin.

### 80 ára føðingardagur
Mánadagin 16. august verður Erling Hansen Funningsfjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini, Tjarnarlág 15, Tórshavn, sama dag millum kl. 17 og 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 75 ára føðingardagur
21. august fyllir Elisabeth Joensen í Vági, fyrrverandi fyrustøðukvinna hjá heimarøktini, 75 ár. Í hesum sambandi bjóðar Elisabeth til brunch í Billiardhúsinum, leygardagin 14. august, frá kl. 10-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 65 og 75 ára føðingardagur
Leygardagin 21. august halda Jensya Magnussen (Kastalag) 75 ára og Karin Kastalag 65 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í húsinum hjá Eldrafelagnum NÓN, Torvgøta 2 í Saltangará frá kl. 13 – 19.

### 60 og 70 ára føðingardagur
Fríggjadagin 13. august fyllur Sólbjørg Thomasen, Tórshavn, 60 ár og fríggjadagin 27. august fyllur Hilda Debes, Oyri, 70 ár, Systrarnar halda føðingardagin í Eydnuni á Oyrabakka leygardagin 28. august kl. 17 og úteftir. Tey, ið ynskja at heilsa uppá okkum verða vinarliga biðin um at siga frá innan 23. august á tlf. 313448/503448 (Sólbjørg) ella 422234/266334 (Hilda)



